# Fýra spennandi størv í Uttanríkisráðnum

Vilt tú vera við til at byggja upp okkara Uttanríkistænastu, fremja okkara uttanríkismál og tryggja føroyingum rúmari ræsir í altjóðasamfelagnum? Í Uttanríkisráðnum umsita vit hópin av spennandi málum, ið hava týdning fyri okkara áhugamál og samstarv í altjóðasamfelagnum, eitt nú at umboða Føroyar í altjóða felagsskapum; at virka fyri útflutningi og frælsum samhandli; at tryggja okkara rættindi og skyldur í altjóða høpi; at skipa fyri mentanarligum og vinnuligum átøkum í øðrum londum og at fremja eina virkna og dagførda kunning um Føroyar. Í løtuni hesi størv leys at søkja:

### Deildarstjóri til deild fyri ‘Human Resource Management’

Tú fært ábyrgdina av at umsita mannatilfeingi í Uttanríkistænastuni í serliga breiðum týdningi, eitt nú vanligu starvsfólkaviðurskiftini, trivnað, førleikamenning og flytføri hjá starvsfólkum millum deildir eins og millum Uttanríkisráðið og sendistovurnar; at umsita avrikssáttmálar millum Uttanríkisráðið og sendistovurnar; at umsita fíggjarviðurskifti og hølisviðurskifti; og at umsita skjalaskráseting og bókhald, umframt onnur serlig viðurskifti eitt nú trygd og KT-viðurskifti.

Vit vænta, at tú hevur nomið tær samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi ella aðra samsvarandi útbúgving.

### Skjalavørður

Tú fær ábyrgdina av at umsita skjalaskráseting og KT-viðurskifti hesum viðvíkjandi, umframt at handfara vitan og upplýsingar, bókasavn, skjalasavn og skjalatrygd hjá allari Uttanríkistænastuni.

Vit vænta, at tú hava antin nomið sær útbúgving sum bókavørður ella aðra viðkomandi útbúgving og royndir innanfyri yrkið ella viðkomandi útbúgving á bachelorstigi.

### Fulltrúi í havpolitikki

Tú fert saman við øðrum at umsita eina røð av altjóðapolitiskum málum innanfyri hav, tilfeingi, umhvørvi, veðurlagsbroytingar og sjálvberandi menning. Eisini verður føroyski limaskapurin í felagsskapum sum eitt nú Arktiska Ráðnum, OSPAR, FAO, NAFO, NEAFC, NASCO, NAMMCO og IWC umsitin her.

Vit vænta, at tú hevur nomið tær samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi ella aðra samsvarandi útbúgving.

### Fulltrúi í handilspolitikki

Tú fert saman við øðrum at umsita eina røð av handilspolitiskum málum eitt nú alheimsgerð, altjóða handilspolitikk, Heimshandilsfelagsskapin (WTO), Hoyvíkssáttmálan, Evropiska Fríhandilsfelagsskapin (EFTA), Evropasamveldið (ES) og aðrar fríhandilssamráðingar og fríhandilssáttmálar.

Vit vænta, at tú hevur nomið tær samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi ella aðra samsvarandi útbúgving.

Felags fyri øll størvini er, at tú hevur politiskt tev og góð samstarvsevni, er tænastuhugaður og lagaligur, er miðvísur og sjálvstøðugur, er stinnur í føroyskum og enskum máli, umframt at tú hevur kunnleika til onnur mál. Vinaliga set teg í samband við Joan Ólavsdóttir á telefon +298 351051, at frætta meira um størvini. Umsóknir við prógvum og øðrum skjølum skulu sendast til Uttanríkisráðið, Tinganes, FO-100 Tórshavn ella í telduposti til mfa@mfa.fo og vera frammi í seinasta lagi mánadagin 11. august 2008.

UTTANRÍKISRÁÐIÐ

Tel. +298 306100 • Fax +298 306105 · www.mfa.fo mfa@mfa.fo

Føroyska Uttanríkistænastan fevnir um Uttanríkisráðið og sendistovur Føroya til London, Keypmannahavnar, Evropasamveldið og Reykjavíkar og er ein og sami myndugleiki. Høvuðsleikluturin hjá Uttanríkisráðnum er at samskipa føroyska uttanríkispolitikkin og at tryggja áhugamál Føroya í altjóðasamfelagnum.

---

**Endurlýsing**

# Fulltrúi til Almanna- og heilsumálaráðið

**Eitt starv sum fulltrúi í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan sum skjótast, ella eftir nærri avtalu.**

### Um starvið

Talan er um eitt starv á heilsupolitisku deildini, har tú kemur at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og at ráðgeva um fíggjarviðurskifti og onnur fyrisitingarlig viðurskifti í hesum sambandi. Harumframt kemur tú at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Almanna- og heilsumálaráðið.

Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í samband við, at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini á deildini. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

### Førleikakrøv

Viðkomandi búskaparfrøðilig, ella samfelagsfrøðilig útbúgving frá hægri lærustovni, ella drúgvar royndir frá almennari umsiting. Góðan teldukunnleika, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.
Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

### Lønar- og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð. Tann sum settur verður, má kunna tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum og starvstaðnum.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

### Nærri upplýsingar

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, tlf. nr. 30 40 50 ella teldupost: turid@ahr.fo

### Umsóknarfreist

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 8. august 2008, kl. 12:00.



ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 304050 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

KREA